**Løgtingið**

23. februar 2017
Mál: 17/00065-1
Viðgjørt: JTN

**Løgtingsmál nr. xx/201x: Uppskot til broyting í løgtingslóg um kommunustýri (kommunustýrislógin)**

**Uppskot til**
**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kommunustýri**
(heimildir hjá landsstýrismanninum at seta tiltøk í verk mótvegis kommunalum samstørvum)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 87 frá 2000 um kommunustýri (kommunustýrislógin), verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 48 verður aftan á "kommununum" sett: "og kommunalum samstørvum".
**2.** Í § 55, stk. 6 verður aftan á 1. pkt sett: "Ásetingar í stk. 1-5 eru eisini galdandi fyri kommunusamstørv, ið eru ásett í aðrari lóggávu"
**3.** § 33, stk. 2 verður orðað soleiðis: "Er einki annað ásett, er uppskot samtykt, tá ið fleiri atkvøður eru fyri enn ímóti. Stendur á jøvnum, er uppskotið fallið."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsøkir til uppskotið

Heilsu- og innlendismálaráðið metir, at heimild skal verða fyri at seta tiltøk í verk sambært kommunustýrislógini mótvegis kommunusamstørvum, ið eru ásett við lóg.

Við løgtingslóg nr. 71 frá 2003 um broyting í løgtingslóg um kommunustýri, varð gjørd ein broyting í § 14, stk. 2, um hvussu kommunustýrið samtykkir eitt uppskot. Við broytingini í 2003 broyttist atkvøðuhátturin í kommunustýrinum soleiðis, at hesin samsvaraði við atkvøðuháttin í Løgtinginum. Av einhvørjari orsøk varð § 33, stk. 2 ikki broytt samsvarandi, men við hesi broyting verður atkvøðuhátturin í nevndunum tann sami sum í kommunustýrinum og Løgtinginum. Broytingin í § 33, stk. 2 í hesum lógaruppskoti skal síggjast í ljósinum av broytingini í 2003.

### 1.2. Galdandi lóggáva

§ 51 í kommunustýrislógini fevnir um "*kommunusamstørv, ið hava við sær avmarkingar í teimum lógarásettu heimildunum, sum kommunustýrið hevur eftir hesi lóg*". Sambært viðmerkingunum til greinina fevnir greinin einans um avtalur um samstarv millum kommunur. Kommunalt samstarv, ið er beinleiðis ásett í aðrari lóggávu, er ikki fevnt av § 51. § 55, stk. 1-5 í kommunustýrislógini ásetur hvørji rættartiltøk landsstýrismaðurin (kommunala eftirlitið) hevur mótvegis ólógligheitum í kommunustýrinum. Sambært § 55, stk. 6 eru ásetingarnar í stk. 1-5 eisini galdandi fyri kommunusamstørv sbrt. § 51.

Hetta hevur við sær, at landsstýrismaðurin ikki hevur heimildir at seta tiltøk í verk mótvegis kommunusamstørvum, sum eru ásett við lóg. Sum dømi um kommunal samstørv ásett í lóg hava vit í Føroyum

1) kommunalar barnaverndartænastur og
2) kommunal samstørv um heimatænastu, eldrarøkt v.m.

Um serlóggávan ikki inniheldur ásetingar um heimildir hjá landsstýrismanninum at seta tiltøk í verk mótvegis ólógligheitum í kommunusamstørvunum, so hevur landsstýrismaðurin ikki møguleika at hava eftirlit við hesum samstørvum.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at geva landsstýrismanninum heimildir til at seta tiltøk í verk mótvegis møguligum ólógligheitum í kommunusamstørvum.

Endamálið við broytingini í § 33, stk. 2 er at broyta atkvøðuháttin í nevndunum, soleiðis at hann passar til atkvøðuháttin í kommunustýrinum og við tann atkvøðuháttin, sum er í Løgtinginum.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Við broytingini fær landsstýrismaðurin heimild til at seta tiltøk í verk mótvegis kommunalum samstørvum á sama hátt sum hann hevur mótvegis kommunustýrum og tess limum.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið verður sent til ummælis hjá øllum aðalmálaráðum og Kommunufelagnum.

**Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum**

**2.1. Fíggjarligar avleiðingarnar fyri land og kommunur**
Mett verður, at uppskotið ikki hevur fíggjarligar avleiðingar.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Mett verður, at uppskotið ikki hevur stórvegis avleiðingar fyri land og kommunur.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Mett verður, at uppskotið ikki hevur avleiðingar fyri vinnuna.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Mett verður, at uppskotið ikki hevur avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Mett verður, at uppskotið ikki hevur avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Mett verður, at uppskotið ikki hevur avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Tað eru ikki millumtjóðasáttmálar á økinum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Tað eru ikki tvørgangandi millumtjóðasáttmálar á økinum.

**2.9. Marknaforðingar**
Mett verður, at uppskotið ikki hevur við sær marknaforðingar.

**2.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv**
Sambært § 55, stk. 2 kann landsstýrismaðurin áleggja teimum kommunustýrislimum, sum bera ábyrgd av at kommunustýrið heldur seg óvirkið mótvegis lógarásettum skyldum, tvingsilsbøtur. Um uppskotið verður samtykt, fer landsstýrismaðurin á sama hátt at kunna áleggja limum í kommunalum samstørvum tvingsilsbøtur. Ein tvingsilsbót í hesum sambandi skal ikki síggjast sum ein revsing, men sum ein miðil hjá landsstýrismanninum at seta tað í verk, sum kommunustýri ella kommunala samstarvi hevur skyldu til at gera.

**3.11. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greina

**Til § 1**
Broytingin staðfestir, at landsstýrismaðurin hevur eftirlit við kommunum og kommunalum samstørvum.

**Til § 2**
Á sama hátt, sum landsstýrismaðurin kann seta tiltøk í verk mótvegis kommunustýrum og kommunalum samstørvum sbrt. § 51 í lógini, fær landsstýrismaðurin við hesum heimildir at seta tiltøk í verk mótvegis kommunalum samstørvum, ið beinleiðis eru ásett í aðrari lóggávu. Um landsstýrismaðurin ikki skal hava hesar heimildir, skal tað verða ásett í lóggávuni, at landsstýrismaðurin ikki hevur hesar heimildir og harvið heldur ikki eftirlit við hesum kommunalu samstørvunum.

**Til § 3**
Hetta verður broytt soleiðis, at atkvøðuhátturin í nevndum samsvara við atkvøðuháttin í kommunustýrinum. Víst verður annars til viðmerkingar í løgtingsmál nr. 102/2003.

Heilsu- og innlendismálaráðið, xx.xxx. 2017.

**Sirið Stenberg**
landsstýrismaður

/ Navn á embætisfólki